# Gongur ongan veg

*Semingsmenninir mettu á middegi í gjár, at lítið hendi í samráðingunum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið*

Dagfinn Olsen

Á middegi í gjár vistu semingsmenninir at siga, at framstigini vóru smá í samráðingunum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag.

Partarnir fóru til samráðingar á Hotel Føroyum mikudagin klokkan 14 og í gjár helt Allan Skaalum, semingsmaður, at partarnir stóðu við eitt vegamót.

Hann segði, at gongdin var sera tung og metti, at støðan var ikki haldbar.

Við tað at partarnir hava verið leingi saman og standa við eitt vegamót meinti Allan Skaalum, at støðan nú var tann, at partarnir nú máttu umhugsa sínar prinsippiellu støður.

Hvussu longi semingsmenninir ætlaðu at halda á, dugdi Allan Skaalum ikki at siga á middegi í gjár, men ongar ætlanir vóru tá um at gevast við royndunum at finna semju.



*Tað gongur ikki væl at finna semju millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið. Arbeiðssteðgur hevur verið í 5 vikur og samráðst hevur nú verið í tvey samdøgur uttan slit*


team 85 · 31 65 11

SMYRIL LINE
Í SMS
... á torginum
17., 18. og 19. apríl

Bilpakkar -
4 fólk í bili

Ferðist bíliga, Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin
Fráf. Tórshavn
19/5, 26/5, 2/6, 9/6, 1/9, 8/9
Fráf. Hanstholm
13/5, 20/5, 27/5, 3/6, 10/6, 17/6, 19/8, 26/8, 2/9
Til Danmarkar úr einans 775,- fyri hvønn

Ferðist bíliga, Tórshavn - Bergen ella hinvegin
Til Noregs úr einans 480,- fyri hvønn

Ferðist bíliga, Tórshavn - Lerwick ella hinvegin
Til Hetlands úr einans 385,- fyri hvønn

Ferðatilboð við Norrönu

Flogdeildin
Aberdeen hósdag til mánad. við innivist úr einans 3.113,-
USA/Canada úr Føroyum úr einans 2.900,-
Portugal ein vika úr Føroyum úr einans 5.348,-

Ferðaavgj. ikki íroknaði

SMYRIL LINE
e-mail:
booking@smyril-line.fo

Ring og hoyr meira!
Tel 34 5900


## Føroya Lærarafelag fær stuðul

Í útsendum skrivi boðar Gymnasieskolernes Lærerforening (GL) í Danmark frá, at felagið stuðlar Føroya Lærarafelag í sínum krøvum um betri arbeiðsumstøður.

GL heldur vera órímiligt, at tað við lóg verður álagt lærarum meira arbeiði, uttan at játtanir fylgja við.

GL stuðlar Føroya Lærarafelag í sínum krøvum um, at tað við nýggjum sáttmála verður veitt meira tíð til at taka sær av uppgávunum og at borið verður so í bandi, at nýggja lógin kann fremjast í verki.

*- do -*

## Mús funnin á MARS

Barnablaðið hevur 46. árgangir á baki. Í fjør kom blaðið í nýggjum og sera nýmótanssniði. Blaðið er í tveimum - til yngri og til eldri børn. Og navnið er eisini broytt eftir hesum. Deildin til tey yngru kallast Snirr og til tey eldru Strok.

Nógv og litríkt tilfar er í blaðnum, ið leggur dent á at hava tilfar við, sum er frammi júst nú, umframt nakað av góðum, gomlum tilfari.

Ynskimyndin hesaferð er av Creamy og kann takast út og t.d. hangast á veggin.

Úr tilfarinum er m.a. henda snildisliga myndin frá 7. flokki í Leirvík, ið hevur givið lokkandi yvirskriftina á forsíðuni á blaðnum: Mús funnin á MARS!




# Virðing fyri teim psykiskt sjúku

*Í dag, 15. apríl, verður almennur fyrlestur í MBF-húsinum, har Jóhanna Andreasen røður um »Virðing fyri teim psykiskt sjúku«*

Dagfinn Olsen

Tað er Sinnisbati, sum skipar fyri almenna fyrilestrinum, ið verður í MBF húsinum, Íslandsvegur 10 C.

Fyrilesturin verður í dag, 15. apríl, klokkan 15. Jóhanna Andreasen, sjúkrasystir røður um evnið »Virðing fyri teim psykiskt sjúku«. Møguleiki verður at seta spurningar.

Fyrireikararnir vænta eitt gagnligt orðaskifti um eitt sera viðkomandi evnið, nú Sjónvarpið hevur víst, hvussu vánaligum standi psykiatriskar deildir eru í. Eisini minna fyrireikararnir á tann veruleika, at hesar deildir verða stongdar í tríggjar mánaðir í summar, vegna sparingar.




Sinnisbati heitir á øll innan psykiatriska økið um at koma til fundar. Hetta er eisini galdandi fyri tey, ið eru avvarðandi og tey, ið eru um psykiskt sjúk og veik í gerandisdegnum.

Tað er ikki neyðugt at vera limur fyri at koma á fundin.

Eftir fundin og fyrilesturin, hevur Sinnisbati aðalfund.



# Samgongan er lopin á bláman

*Fyrrverandi formaður Sjálvstýrisfloksins, Hilmar Kass, heldur samgonguna arbeiða eftir beint øvugtum leisti í fullveldismálinum*

John Johannessen

– Sjálvsagt áttu vit at loyst frá Danmark stig fyri stig. Men tað, samgongan ger í løtuni, er beint øvugt. Hon vil hava fullveldi her og nú og síðani samráðst aftur við danir um at umsita ymisk málsøki fyri okkum, ið vit ikki eru før fyri at umsita.

Hilmar Kass, ið umboðaði Sjálvstýrisflokkin á tingi frá 1966 og heilt fram til 1988, er alt annað enn samdur við tí politikki, samgongan í løtuni førir.

Sjálvstýrisflokkurin, sum er partur av samgonguni, skal hava landsfund í Klaksvík 5. mai, og tá ætlar Hilmar Kass sær at gera vart við ónøgd sína um politikkin, flokkurin, hann sjálvur hevur verið formaður í, førir.

### Eingin vegur aftur

Hilmar Kass ásannar, at samgongan er komin so mikið langt í fullveldismálinum, at tað ikki vendst aftur. Hetta harmar hann almikið, tí hann heldur ikki, at vit eru til reiðar at fáa fullveldi soleiðis alt í einum.

Hilmar Kass hevur sjálvur drúgvar royndir við at samráðst móti stórveldum. Hann var formaður í marknaðarnevndini í sjeytiárunum, og var sostatt saman við Atla Dam, løgmanni, við at gera fyrstu avtaluna við EEC.

Hesin sami Hilmar Kass, ið hevur fylgt væl við gongdini í fullveldismálinum, ásannar, at frægasta boð, ið seinastu tíðina er komið um eina nýggja ríkisrættarliga skipan, er sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum.

– Eg haldi, at vit eiga at yvirtaka málsøki so hvørt vit eru før fyri tí, og sostatt útbyggja sjálvstýri so hvørt. Hetta leggur uppskotið hjá Javnaðarflokkinum upp til, sigur Hilmar Kass.

Garvaði, men hóvligi sjálvstýrismaðurin dámar ikki prátið um skiftistíð. Hann heldur, at tá landsstýrið sær seg ført fyri at gera ein sáttmála, ið sigur, at vit eru óheft av Danmark um 15 ár, kunnu vit eins væl gerast tað beinan vegin.

### Ójøvn á máli

Bróðursonur Hilmar Kass, Jákup Sverri Kass, er annað av umboðum Sjálvstýrisfloksins á tingi undir verandi samgongu. Hann sigur seg taka undir við stórum parti av hóvligu sjálvstýrishugsanini hjá farbróðurinum. Men kortini heldur hann, at vit skulu virða rættin hjá landsstýrinum at samráðast við donsku stjórnina.

– Eg fari at taka eina greiða støðu, tá sáttmálin fyriliggur. Men, sum nú er, haldi eg, at vit skulu lata landsstýrið samráða seg til ein sáttmála við danir, sum vit síðani kunnu taka støðu til.



*Hilmar Kass umboðaði Sjálvstýrisflokkin á tingi frá 1966-88*

Sambært Jákup Sverra Kass eru ymsar meiningar í Sjálvstýrisflokkinum um gongdina í fullveldismálinum. Hann sigur seg sjálvan halda, at ferðin í løtuni er ov nógv, men vísir á, at onnur í flokkinum stuðla landsstýrinum fult og heilt í fullveldismálinum.

– Á landsfundinum skulu vit gera støðuna upp, og fáa eina avgjørda meining um fullveldismálið, ið allur flokkurin kann taka undir við, sigur Jákup Sverri Kass.

# Vápnað rán í handli í Havn

*Hóskvøldið klokkan tíggju hótti ein ungur maður kassadámuna í P. A. Restorff í Havn við byrsu. Maðurin vildi hava peningin í kassanum og fór avstað við tíggju túsund krónum*



*Maðurin hótti kassadámuna við eini byrsu fyri at fáa peningin* **Mynd: Jens Kristian Vang**

John Johannessen

Kassadáman í P. A. Restorff í Havn var einsmøll í handilinum, tá ein ungur maður um tíggju tíðina hóskvøldið kom inn í handilin, rætti henni ein svartan posa og bað hana fylla allan peningin úr kassanum í posan.

Kassadáman visti ikki, at maðurin var vápnaður, og noktaði hon tí í fyrstu atløgu at geva honum peningin. Men tá maðurin undan jakkanum tók fram eina avsagaða byrsu og hótti við at skjóta, kundi hon ikki gera annað enn at geva honum peningin.

Upphæddin, ið var í kassanum var 10.000 krónur. 800 av hesum vóru myndir, meðan restin vóru seðlar og ein kekkur.

Tá maðurin fór avstað aftur úr handilinum, tók hann eina patrón úr lummanum og legði fyri kassadámuna. Hann segði, at hesa skuldi hon eiga. Sambært løgregluni kann hetta fatast sum ein hóttan.

Kriminalløgreglan hevur fá spor at ganga eftir í málinum. Eingi onnur vitni enn kassadáman hava sæð mannin inni í handilinum. Men kassadáman hevur hóast skelkin frá tilburðinum greitt løgregluni frá, at talan var um ein heilt ungan og klænan mann.

Maðurin var í myrkabláðum jakka við hettu. Hettuna hevði maðurin á høvdinum, og fyri at fólk ikki skuldu kenna mannin, hevði hann eina húgvu niður yvir andlitið.

Tá maðurin fór út úr handilinum, var tað eingin, ið sá hann. Myrkt var úti og ljósið í handilinum gjørdi, at kassadáman ikki sá, hvagar maðurin fór, tá hann fór avstað aftur.

Á middegi í gjár hevði løgreglan kortini fingið at vita frá fólkum í grannalagnum, at tey høvdu sæð ein ungan mann longur í brekkuni eitt sindur omanfyri handilin. Tey høvdu lagt til merkis, at maðurin brádliga fór rennandi oman móti handilunum, men gjørdu tey sær ikki størri far um hetta.

Løgreglan heitir á fólk um at siga, sum halda seg vita okkurt um tilburðin, um at siga sær frá sum skjótast.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL (Sýnaður 04-98)
Skrás.: 02-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 218.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 LUNA H/B
Skrás.: 14-12-98
Km.: 21.000
Prísur: 124.600,- Garanti**

TOYOTA CAMRY 2,2 AUT. GEAR (Sýnaður 01-10-99)
Skrás.: 30-05-95
Km.: 69.000
Prísur: 158.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/B
Skrás.: 23-01-96
Km.: 31.000
Prísur: 105.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 05-02-98
Km.: 19.000
Prísur: 154.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,6 GSI SEDAN (Sýnaður 01-99)
Skrás.: 22-10-91
Km.: 171.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA CARINA 1,8 GLI
Skrás.: 05-09-96
Km.: 32.000
Prísur: 132.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.:13-06-95
Km.: 82.000
Prísur: 93.600,-

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 10-04-97
Km.: 41.000
Prísur: 145.600,- Garanti*

HONDA CIVIC 1,5 SEDAN
Skrás.: 23-12-97
Km.: 58.000
Prísur: 124.600,-

TOYOTA CARINA 1,8 GLI
Skrás.: 10-11-95
Km.: 90.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

FORD KA
Skrás.: 23-05-97
Km.: 33.000
Prísur: 78.600,-

TOYOTA CARINA 1,8 GLI
Skrás.: 28-06-95
Km.: 70.000
Prísur: 119.600,- Garanti*

FIAT PUNTO 60 S (Sýnaður 01-97)
Skrás.: 30-01-97
Km.: 42.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 (Sýnaður 10-97)
Skrás.: 10-05-95
Km.: 89.000
Prísur: 108.600,- Garanti*

MITSUBISHI GALANT (Sýnaður 02-00)
Skrás.: 12-06-91
Km.: 205.000
Prísur: 68.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 SEDAN
Skrás.: 04-06-93
Km.: 112.000
Prísur: 89.600,-

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 88.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA CAROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 25-01-99
Km.: 21.000
Prísur: 136.600,- Garanti**

FORD FIESTA 1,3 (Sýnaður 04-96)
Skrás.: 29-04-96
Km.: 104.000
Prísur: 66.600,-

VØRUVOGNUR

TOYOTA LANDCRUISER HJ61
Skrás.: 31-10-89
Km.: 137.000
Prísur: 120.600,-

TOYOTA PREVIA 2400 GLI (Sýnaður 03-98)
Skrás.: 27-12-94
Km.: 58.000
Prísur: 114.600,- Garanti*

TOYOTA HIACE 4x4
Skrás.: 19-10-87
Km.: 165.000
Prísur: 49.600,-

MAZDA 626 SEDAN (Sýnaður 02-98)
Skrás.: 21-09-88
Km.: 161.000
Prísur: 42.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ

HONDA ACCORD (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 15-08-86
Km.: 214.000
Prísur: 12.000,-

* Brúktir bilar yyir 75.000 kr. verða seldir við BRUKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00
TOYOTA Reyni Service
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820